UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **19. august 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-69**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 1/2020 um kringvarpsgjald til landsstýrismannin í uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a) frá Beini Johannesen, løgtingsmanni.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvir landsstovnar, sjálvsognarstovnar, interkommunalir felagsskapir, kommunalir stovnar og vinnufeløg rindaðu kringvarpsgjald fyri 2019?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um broytingar í gjaldinum hjá hesum?

Svar

Svar til spurning 1: Eg havi spurt meg fyri hjá TAKS, sum í 2019 sendi rokningar fyri kringvarpsgjald til:

- 158 almennar stovnar
- 100 kommunur og kommunalar stovnar
- 1.351 vinnufeløg

Landsstovnar og sjálvsognarstovnar eru undir almennum stovnum. Onkur sjálvsognarstovnur rekur barnagarð, hesir eru undir kommununum. Interkommunalir felagsskapir sum SEV og IRF eru undir landsstovnum, meðan onnur interkommunal samstørv so sum samstørv um eldraøkið v.m. eru undir kommununum.

Svar til spurning 2: Samgongan fer at endurskoða kringvarpslógina í hesi tingsetu, herundir kringvarpsgjøldini. Ætlanin er m.a., at gjaldið hjá smærru vinnufyritøkum verður lækkað.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður